# Koyringin av gróti úr Porkeri bjóðast út

**Landsverkfrøðinguri n umhugsar nú at bjóða út koyringina av serliga grótinum í grótbrotinum í Porkeri, sum fyri tað mesta verður flutt norður til verkið í Hundsarabotni. Tað hendir eftir at landsverkfrøðingurin kann staðfesta sparingar uppá 30 prosent, síðan koyringin av grótinum av bryggjuni í Kollafirði niðan í Hundsarabotn varð boðin út í summar**



*- Landsverkfrøðingurin hevur sett sær fyri, at øll koyring fyri stovnin sumfrálíður skal bjóðast út, eisini koyringin úr grótbrotinum í Porkeri, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur*

LANDSVERK-FRØÐINGURIN
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Koyringin við serliga grótinum úr grótbrotinum í Porkeri verður møguliga boðin út í næstum. Tilfarið úr grótbrotinum í Porkeri verður fyri tað mesta flutt til verkið í Hundsarabotni, har tað verður knúst til skerv. Fyrst verður grótið koyrt úr grótbrotinum við lastbilum, síðan verður tað flutt við skipi til Kollafjarðar, har tað verður koyrt við lastbilum niðan í Hundsarabotn.

Sjóvegis flutningurin av grótinum hevur í fleiri ár verið boðin út, og í summar varð eisini koyringin av havnaøkinum í Kollafirði niðan á verkið við Oyggjarvegin boðin út. Oyvindur Brimnes sigur, at landsverkfrøðingurin við seinastu útbjóðingini spardi 30 prosent, sammett við tað, ið stovnurin áður mátti rinda fyri koyringina áðrenn. Hann leggur tó afturat, at hørð kapping var um koyringina í Kollafirði, og tí bar til at fáa prísin so langt niður.

Nú er so bara koyringin úr grótbrotinum í Porkeri eftir at bjóða út. Hesa koyringina hava tríggir lastbilaførarar úr Porkeri røkt seinastu mongu árini.

Oyvindur Brimnes, landsverkførðingur, sigur, at í løtuni verður arbeitt við, hvat skal vera av koyringini úr grótbrotinum í Porkeri. Hann vísir á, at stovnurin hevur sett sær fyri, at øll koyring sum frálíður skal bjóðast út, so ella so. Í samband við útbjóðing hevur landsverkfrøðingurin tríggjar møguleikar. Eina almenna útbjóðing, har øll áhuga sleppa at bjóða, eina innbodna útbjóðing, har landsverkfrøðingurin velur nøkur burturút, og harumframt kann verða biðið um framíhjáboð (eisini nevnt undirhondsboð, blm.), har stovnurin bjóðar arbeiðið kann samráðast við í mesta lagi tveir útbjóðarar. Oyvindur Brimnes sigur, at enn hava tey ikki tikið støðu til, hvør loysn verður vald, men arbeitt verður við málinum í løtuni.

Landsverkfrøðingurin sigur, at tað áður hevur verið vanlig mannagongd at biðja fólk á staðnum gera ymsu arbeiðini fyri stovnin, og síðan hava partarnir avtalað ein fastan prís. Men hann vísir á, at landsverkfrøðingurin millum ár og dag hevur fingið nógvan kritik av hesi mannagongd, og við hesi mannagongd kann tað tíðum vera trupult hjá stovninum at grundgeva fyri, hví ávísir fáa arbeiðini hjá landsverkfrøðinginum. Hann sigur, at kostnaðurin er fremsta grundgeving fyri at velja ein útbjóðara fram um ein annan, og tí er tað gongdin innan stovnin at fáa øll arbeiði boðin út, og leggur afturat, at í fleiri førum kann ein útbjóðing eisini spara stovninum nógvar pengar.

Oyvindur Brimnes veit ikki um ónøgd frá øðrum lastbilaførarum í samband við at teir tríggir lastbilaførarnir úr Porkeri hava røkt koyringina úr grótbrotinum seinastu mongu árini. Hann vísir á, at stovnurin nú fyrst má fara at kanna, hvør háttur er rættastur at nýta í samband við at bjóða úr koyringina í Porkeri. Tað vil siga, um koyringin skal bjóðast út alment, ella at rættast er at royna aðrar møguleikar, sum stovnurin hevur í samband við útbjóðing.

### Kemur illa við

Tíðindini um at arbeitt verður við at bjóða út koyringina úr grótbrotinum í Porkeri kemur illa við hjá teimum trimum lastbilaførarunum, sum hava røkt koyringina síðstu mongu árini.

– Tað kemur stak illa við, tí hjá tveimum av okkum er hetta einasta koyring, vit hava, sigur Poli Sørensen, sum hevur koyrt grót úr grótbrotinum síðan tíðliga í áttatiárunum. Sjálvur hevur hann krana á sínum bili, og tí hevur hann møguleika til at fáa okkurt smávegis av øðrum arbeiði.

Poli Sørensen vísir á, at tað frammanundan er lítið at koyra í Suðuroynni, og at bilarnir úr Porkeri fáa eingi arbeiði aðrastaðni í oynni.

– Eg veit ikki hvat tað er, men støðan er tann, at vit úr Porkeri sleppa ikki at koyra aðrastaðni í oynni, og tí hava vit bara koyringina úr grótbrotinum at dúva uppá, sigur Poli Sørensen. Hann leggur afturat, at missa teir koyringina, so er bara eitt at gera, og tað er at selja bilarnar.

Teir tríggir lastbilaførarnir í Porkeri hava sum er eina fasta avtalu við Landsverkfrøðingin, har teir fáa tíggju krónur fyri hvørt tonsið, sum teir koyra úr grótbrotinum oman til grótbátin, sum flytir tilfarið norður á Kollafjørð. Poli Sørensen vísir á, at teirra bilar eru ikki so stórir og lasta ikki so nógv, og tí kann tað vera trupult at kappast við aðrar størri bilar, um arbeiðið verður boðið út. Bilarnir, sum koyra grót úr grótbrotinum, lasta upp í 12 tons, og við tí koyring, sum er í dag, røkkur tilboðið til eina vanliga tímaløn, sigur Poli Sørensen.

Tíðindini um útbjóðingina av koyringini fella heldur ikki í góða jørð í bygdaráðnum í Porkeri. Eli Petersen, borgarstjóri sigur, at kommunan av fullum huga stuðlar teimum trimum monnunum, sum í dag hava koyringina um hendi. Eli Petersen vísir á, at flutingurin av grótinum gongur gjøgnum bygdina, og vegurin er als ikki gjørdur til tílíka tunga ferðslu – heldur ikki til lastbilarnar sum í dag koyra grótið oman á havnaøkið.

– Bygdarráðið hevur frætt, at tað er í umbúna at bjóða koyringina út, og tí hava vit boðað lastbilaførarunum úr bygdini frá, at vit stuðla teimum, sigur Eli Petersen, sum kennir seg sannførdan um, at missa teir tríggir lastbilaførarnir koyringina úr grótbrotinum, so missa teir sítt livibreyð, tí annað arbeiði fáa teir ikki í oynni.

### Helst ikki í ár

Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur, sigur, at í løtuni verður kannað, hvør møguleiki er bestur at royna í samband við eina komandi útbjóðing av koyringini úr grótbrotinum í Porkeri. Men enn væntar tó nakað í, og tí roknar Oyvindur Brimnes neyvan við, at arbeiðið verður boðið út í ár.



*Seinastu mongu árini hava tríggir lastbilaførarar úr Porkeri havt um hendi koyringina við serliga grótinum úr grótbrotinum í bygdini til havnaøkið, har grótið síðan er flutt norður á Kollafjørð, og síðan niðan í verkið í Hundsarabotni. Nú koyringin í Porkeri væntandi verður boðin út, stúra lastbilaførarnir fyri at missa koyringina*



Jógvan A. Hansen fyllir 104:

# Hevur livað í trimum øldum

**Hósdagin fyllir vestmenningurin Jógvan A. Hansen 104 ár. Ikki eru nógv, sum kunnu, eins og Jógvan, reypa av, at tey hava livað í heili trimum øldum**



*Henda myndin varð tikin til 100 ára føðingardagin hjá Jógvan A. Hansen. Í morgin, hósdagin fyllir hann 104 ár*

FØÐINGARDAGUR
*Ingrid Bjarnastein*

Nógv varð gjørt burturúr tá Jógvan A. Hansen fyri fýra árum síðani fylti 100 ár. Tann dagurin varð hildin í bygdarhúsinum í Vestmanna, har fólk fingu høvi at heilsa upp á heiðursgestin.

Í morgin, hósdagin, eru liðin fýra ár síðani Jógvan A. Hansen fylti 100 ár, og tí verður hann sostatt 104 ára gamal henda dagin.

Jógvan A. Hansen hevur trý børn, tvær døtur og ein son. Og hevur hann eisini bæði abba- og langabbabørn.

Tann eina dóttirin, Jona Jacobsen, fortelur, at hann hevur verið væl fyri síðani hann fylti 100, men nú er hann troyttur og seingjarliggjandi.

Hesuferð verður ikki gjørt so nógv burturúr føðingardegnum. Hann verður hildin fyri familjuni.

Dóttirin, Jona, sigur, at nú tosar hann ikki so nógv longur, men hon minnist, tá hann fortaldi frá tíðini hann sigldi undir krígnum. Tá sigldi hann við føroyskum bátum til Onglands. Jógvan Hansen hevur livað ungdómin millum fólk, sum livdu áðrenn og samstundis sum einahandilin varð avtikin, og hann hevur verið ein partur av risastóru broytingini, tá føroyska samfelagið fór frá at vera bóndasamfelag til fiskivinnusamfelag.

Sosialurin ynskir Jógvani A. Hansen og familjuni hjartaliga tillukku við føðingardegnum.

Møguligur vinningur fyri FAS:

# Norsk reiðarí hótta við at flyta flotan

**Tvey tey størstu ferjureiðaríini í Noregi hótta við at flyta flotan hjá sær úr Noregi til onnur lond. Føroyar hava eisini verið upp á tal í hesum samanhanginum**



*Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskimálum sigur, at um eitt so stórt og viðurkent reiðarí sum Fjord Line, flytir flotan til Føroyar, verðu tað eitt stórt gjøgnum brot fyri FAS*

*Savnsmynd*

FERJUFLOTI
*Ingrid Bjarnastein*

Color Line og Fjord Line, sum eru tvey tey størstu ferjureiðaríini í Noregi, hótta við at flyta flotanar hjá sær til onnur lond. Hetta kemst av, at norska stjórnin hevur hert lóginia viðvíkjandi lønunum hjá sjómonnum.

Sjómenn í Noregi skulu nú skattast sum allir aðrir norðmenn og lønast við eini bruttoløn, sum teir skulu gjalda skatt av. Áðrenn hevði stjórnin góðkent, at tey, ið arbeiddu umborð á ferjunum, skuldu fáa eina nettoløn, men í tí førinum hevur stjórnin skift meining.

Trupulleikin hjá teimum norsku reiðaríunum er, at lógirnar eru øðrvísi í hinum Norðanlondunum, t.d. Svøríki og Danmark. Her skulu reiðaríini bara gjalda eina nettoløn og kunnu tí spara fleiri milliónir krónur á lønkontoini.

Jyllandsposturin skrivar, at norska reiðaríið Fjord Line umhugsar av álvara, at flyta flotan til Føroya. Men hetta vilja tey hvørki játta ella vátta á Fjord Line.

– Vit hava hugt eftir nógvum ymiskum londum, og har eru Føroyar ein møguleiki, sigur Atle Kvamme, kunningarstjóri á Fjord Line við Sosialin.

– Men vit vóna sjálvandi fyrst og fremst, at norska stjórnin broytir hesar lógirnar, soleiðis, at vit framhaldandi kunnu vera undir norskum flaggi. Men fíggjarlógin verður helst ikki klár fyrr enn í desember, so vit vita onki fyrr enn um hálvan desember. Enn er so eingin avgerð tikin um, hvagar flotin hjá okkum skal flytast.

### Fingið fyrispurningar

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskimálum, sigur, at fleiri fyrispurningar hava verið frá norskum reiðaríum. Nøvn vil hann tó helst ikki koma inn á. Men hann vil tó siga so mikið sum, at um ein so stórt norskt reiðarí, sum Fjord Line, sum er næst størsta ferjureiðaríið í Noregi, vil lata seg skráseta hjá FAS – Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini – merkir tað inntøkur til samfelagið.

– Um eitt so stórt og viðurkent reiðarí hevði flutt sín flota til Føroya, hevði tað verið tað stóra gjøgnumbrotið fyri FAS, tí so høvdu eisini fleiri fylgt aftaná. Men eg haldi vit skulu vera varin við at vera ov optimistisk, sigur Jørgen Niclasen, sum vísir á, at eitt norskt skip, Bergina, longu hevur latið seg skrásett í Føroyum. Bergina er 70.000 bruttotons, og til samanberingar kann sigast, at Norröna er 8000 bruttotons.

Jørgen Niclasen sigur annars, at nógv hevur verið arbeitt við FAS skipanini, og ætlanin er at marknaðarføra hana uttanlands komandi ár.

– Arbeitt verður við at gera skipanina betri, so tað ber til hjá okkum at vera við í kappingini um at fáa skip skrásett her í Føroyum. Men tað er langt eftir á mál, men arbeitt verður enn við tí. Skipanin er 10 ára gomul, men hon kann saktans gerast til eina góða inntøkukeldu fyri landið, eins og hon er tað á Isle of Man, sigur Jørgen Niclasen, sum tó slær fast, at hann vil ikki siga ov nógv viðvíkjandi nøkrum norskum reiðaríið.